1. **Hin tríeindi Gud** Vit trúgva á *ein* Gud, sum altíð hevur verið, er og verður tríggir eins guddómligir Persónar: Faðirin, Sonurin og Heilagi Andin, sum kenna, elska og dýrdargera hvør annan. Hesin eini, sanni og livandi Gud er óendaliga fullkomin, bæði í kærleika og heilagleika Hansara. Hann er Skapari alra luta, bæði sjónliga og ósjónliga, og er tí verdur alla dýrd og tilbiðjan. Longu úr upphavi kennir Hann endan fullkomiliga og nágreiniliga, tí Hann er hin ódeyðiligi og ævigi. Tí uppiheldur og valdar Hann eisini øllum fullkomiliga. Grundað í fyrivitan Hansara, fremur Hann æviga og algóða ráð Sítt, sum er at leyskeypa sær eitt ognarfólk og at endurnýggja Hansara falna skapning, hátignarliga navni Hansara til prís.

2. **Opinbering** Í stóru náði Síni hevur Gud avdúka tilveru Sína og mátt Sín í fyriskipanum skapnings Hansara og Hann hevur opinbera seg sjálvan á undurfullan hátt fyri falnum menniskjum í Syni Sínum, Orðinum, sum var hold. Harumframt er Gud ein talandi Gud, sum við Anda Sínum hevur innblást orðini, sum varðveitt eru í Skriftini, í teimum sekstiseks bókum Gamla og Nýggja Testamentis, sum bæði eru vitnisburður um — og miðil í — hansara frelsandi gerningi í heiminum. Eina hesar skriftir eru málsliga innblásta Orð Guds, sum fult og heilt hevur myndugleika og er lýtaleyst í upprunahandritunum, fullfíggjað í tess opinbering av vilja Hansara at frelsa, nøktandi í mun til alt, sum Gud vil hava okkum at trúgva og gera og hevur endaligan myndugleika á øllum kunnskaparøkjum, sum tað talar um og til. Vit játta, at bæði avmarking og synd okkara hindra okkum í at kenna sannleika Guds til fulnar, men halda tó fast við, at vit, við upplýsing Anda Guds, av sonnum kunnu kenna Guds opinberaða sannleika. Vit eiga at fata Bíbliuna sum vegleiðing Guds og at líta á hana í øllum, sum hon lærir, at vera orðum hennara lýðin sum boð Guds í øllum, sum hon vil hava okkum til, og vit eiga at líta á hana sum lyfti Guds í øllum, sum hon lovar. Við at hoyra, trúgva og gera eftir Orðinum, verður fólk Guds brynja, sum teir lærisveinar Kristusar, tey eru, at vera vitni til evangelium Guds.

3. **Skapanin av mannaættini** Vit trúgva, at Gud skapti menniskjuna sum mann og kvinnu í mynd Síni. Ádam og Eva hoyrdu heima í tí av Gudi skaptu tilveruskipan, sum Hann sjálvur segði vera sára góða, har tey í staði Guds skuldu tæna og hava umsogan fyri, umsita og ráða yvir skapninginum, grundað í einum livandi og

heilagum samfelagi við Skapara teirra. Menn og kvinnur, sum fyri Gudi eru javnsett og skapt í mynd Hansara, hava somu atgongd til Gud við trúgv á Kristus Jesus og eru bæði kallað at leggja sjálvsøkni og líkasælu av og ístaðin taka uppá seg týðandi uppgávuna at vera virkin í lívinum, bæði heima og úti, í familjuni, samkomuni og samfelagnum. Ádam og Eva vórðu skapt til at styðja og stuðla hvønn annan og vera sameind sum eitt hold, og hendan eind er sett á stovn sum tað einasta reglugevandi mynstrið fyri kynslig sambond millum menn og kvinnur, so at hjúnalagið tænir sum fyrimynd fyri eindini, sum er millum Kristus og samkomuna. Sambært vísa ráði Guds, eru menn og kvinnur ikki eitt og tað sama, men av tí at tey grundleggjandi eru ymisk, hóska tey saman og kunnu soleiðis styðja og ríka hvønn annan sum javnsett. Gud fyriskipar, at tey hava ymiskar leiklutir, sum endurspegla kærleiksfulla sambandið millum Kristus og samkomuna, soleiðis at maðurin virkar sum høvdið í eindini á ein hátt sum endurspeglar umsorgan Kristusar og uppofrandi kærleika Hansara fyri samkomuni, og soleiðis at kvinnan gevur seg undir mann hennara á sama hátt sum samkoman eigur at elska Harra hennara. Í samkomuni eru bæði menn og kvinnur eggjaði at tæna Kristusi og at mennast í fullum máti í teimum mongu og fjøllbroyttu tænastunum fyri fólki Guds. Tann heilt ávísi leiðaraleikluturin, sum í samkomuni er ætlaður og givin egnaðum monnum er grundaður í skapanini, fallinum og frelsuni og má tí ikki setast til síðis og tillagast alt eftir skiftandi mentanarligum rákum.

4. **Syndafall** Vit trúgva, at Ádam, sum skaptur var í mynd Guds, rongdi hesa mynd og misti hesa upprunaligu signing — bæði vegna seg sjálvan og allar eftirkomarar hansara — við tað at hann fall í synd gjøgnum freisting Satans. Sum ein fylgja av hesum falli, eru øll menniskju vorðin Gudi fremmand, avlagaði og spilt á allan hátt (T.d. likamliga, sinnisliga, kensluliga, andaliga og í viljanum) og endaliga og óbroytiliga dømd til deyða — burtur frá Guds náðiríku uppílegging. Øll menniskju hava tí fullkomiliga tørv á at fáa frið við Gud, undir hvørs rættvísu og heilagu vreiði vit eru; einasta vón menniskjanna er, at hesin sami Gud gevur teimum óuppiborna kærleika Sín, og bara Hann kann bjarga okkum og endurnýggja okkum til samfelag við Seg.

5. **Ætlan Guds** Vit trúgva, at Gud frammanundan øllum í náði Síni gjørdi av at frelsa ein veldiga stóran hóp av skyldigum syndari av øllum fólkasløgum, ættum, tjóðum og tungumálum, við tað at Hann bæði kendi og útvaldi tey frammanundan. Vit trúgva, at Gud rættvísger og heilagger tey, sum av náði hava trúgv á Jesus, og at Hann ein dag fer at dýrdargera tey — dýrdmiklu náði Hansara til prís. Í kærleika biður og býður Gud øllum menniskjum at venda við, angra og trúgva, samtíðis sum Hann hevur ein frelsandi kærleika til tey, sum Hann hevur útvalt og hevur ásett Kristus at vera teirra endurloysara.

6. **Evangeliið** Vit trúgva, at evangeliið er gleðiboðskapur Jesu Krists, Hann, sum er sjálvur vísdómur Guds. Hesin gleðiboðskapur, sum er heiminum dárskapur, hóast hann er kraft Guds fyri øll, sum verða frelst, er kristologiskur, og miðdepil hansara er krossurin og uppreisnin. Um Kristus ikki verður kunngjørdur, verður evangeliið heldur ikki kunngjørt, og hin sanni Kristus er ikki kunngjørdur, um deyði og uppreisn Hansara ikki er miðdepil í prædikuni (Boðskapurin er: "Kristus doyði fyri syndir okkara…[og] reis úr grøvini"). Hesi góðu tíðindi eru bíbilsk (Deyði og uppreisn Hansara eru verulig sambært Skriftunum), guðfrøðilig og hava frelsandi megi (Kristus doyði fyri syndir okkara fyri at gera okkum sátt við Gud), søgulig (Um hesar frelsandi hendingar ikki fóru fram, er trúgv okkara tóm, vit eru tá enn í syndum okkara, og tað er tá meiri grund at tykjast synd í okkum enn nøkrum øðrum), ápostólsk (Boðini vórðu givin ápostlunum, sum vóru eygnavitni til hesar frelsandi hendingar, og teir bóru síðani boðini til onnur), og ógvuliga persónlig og innilig (Har sum eintaklingar taka ímóti, trúgva og halda fast við boðskapin).

7. **Endurloysingin í Kristusi** Vit trúgva, at ævigi Sonur Guds, í kærleika og lýdni móti Faðiri Sínum, gjørdist menniskja: Orðið varð hold, fult og heilt Gud, og fult og heilt menniskja; ein Persónur við tveimum náttúrum. Maðurin Jesus, Ísraels lovaði Messias, varð gitin á undurfullan hátt gjøgnum virki Heilaga Andans, og varð føddur av Mariu moy. Hann var himmalska Faðiri Sínum lýðin í einum og øllum, livdi eitt syndafrítt lív, gjørdi undur og tekin, varð krossfestur av Potiusi Pilatus, reis triðja dagin likamliga frá teimum deyðu og fór upp til himmals. Sum Kongur og millummaður situr Hann við høgru hond Gud Faðirs, haðani hann útinnir alt vald og

alla stýring Guds í himli og á jørð og er okkara Høvuðsprestur og rættvísi talsmaður. Vit trúgva, at Jesus Kristus — við at gerast hold og við lívi, deyða, uppreisn og himmalferð Síni — vísti seg sum umboðsmann okkara og útinti alt hetta í staði okkara. Hann gjørdi alt hetta, so vit í Honum kundu verða rættvísi Guds. Á krossinum útstrikaði hann syndina, blíðkaði Gud, og, við at bera alla revsingina fyri syndir okkara, samdi Hann øll tey, sum trúgva, við Gud. Við uppreisn Hansara var Kristus Jesus staðfestur av Faðirinum, breyt vald deyðans og sigraði á Satani — sum einaferð hevði vald deyðans — og veitti øllum fólki Sínum ævigt lív. Hann er við himmalferð Síni æviga lyftur upp sum Harri og hevur gjørt okkum stað tilreiðar, so vit kunnu vera har, sum Hann er. Vit trúgva, at frelsa er í ongum øðrum, tí undir himli er einki annað navn givið, sum vit kunnu verða frelst við. Av tí at Gud útvaldi tað, sum hevði heiminum lítið at týða — tað vanvirda, tað, sum einki var, fyri at gera til einkis tað, sum var nakað — kann einki menniskja nakrantíð rósa sær fyri Honum — Kristus Jesus er fyri okkum vorðin vísdómur Guds — sum merkir, at hann er rættvísi, heilagleiki og endurloysing okkara.

8. **Rættvísgeringin av syndarum** Vit trúgva at Kristus, við lýdni og deyða Sínum, fult og heilt hevur goldið skuldina hjá øllum teimum, sum eru rættvísgjørd. Í okkara stað bar Hann, við ofri Sínum, revsingina fyri syndir okkara, og okkara vegna uppfylti Hann soleiðis rættvísi Guds — rættiliga, veruliga og fullkomiliga. Okkara vegna uppfylti Hann eisini rættvísu krøv Guds, við fullkomna lýdni Sínum, við tað at hetta fullkomna lýdni við trúgv eina verður tilroknað øllum, sum líta á Kristus eina fyri at verða góðtikin av Gudi. Við tað at Kristus av Faðirinum var givin fyri okkum og við tað at Faðirin, av fría vilja Sínum og ikki orsakað av nøkrum, sum hevði við okkum at gera, góðtók lýdni og revsing Hansara í okkara stað, er henda rættvísgering eina og aleina grundað í fríu náði Guds, fyri at bæði neyva rættvísi Guds og ríka náði Hansara kundi verða ærd í rættvísgeringini av syndarum. Vit trúgva, at ein sannur íðinskapur í lýdni, bæði persónliga og alment, flýtur frá hesi fríu rættvísgering.

9. **Kraft Heilaga Andans** Vit trúgva, at henda frelsa, sum er staðfest gjøgnum alla Skriftina og tryggja við Jesusi Kristi, verður givin og heimførd til fólk Hansara við Heilaga Andanum. Heilagi Andin, sum er sendur av Faðirinum og Soninum,

dýrdarger Harran Jesus Kristus, og sum annar av tveimum talsmonnum teirra trúgvandi er hann hjá teimum og í teimum. Hann sannførir heimin um synd, rættvísi og dóm, og gjøgnum kraftmikla og loyndarfulla verk Sítt endurføðir Hann andaliga deyðar syndarar við at vekja teir til umvendingar og trúgv, og í Honum eru teir dóptir til sameining við Harran Jesus, soleiðis at teir eru rættvísgjørdir fyri Gudi av náði eina, við trúgv eina, í Jesusi Kristi eina. Gjøgnum Andans verk verða tey trúgvandi endurnýggjað, heilaggjørd og atleidd inn í familju Guds; tey fáa lut í guddómligari náttúru og Gud gevur teimum gávur av alvaldandi hondum Hansara. Heilagi Andin er panturin um lovaða arv teirra trúgvandi, og í hesum núverandi heimi býr hann í teimum, og Hann leiðir, vegleiðir, brynjar, lívgar og ger tey trúgvandi før fyri at liva og tæna eftir fyridømi Kristusar.

10. **Ríkið Guds** Vit trúgva, at tey, sum av náði Guds eru frelst gjøgnum sameiningina við Kristus við trúgv og gjøgnum endurføðingina við Heilaga Andanum, eru borgarar í ríkið Guds og kunnu tí njóta signingarnar í nýggja sáttmálanum: Fyrigeving syndanna, innvortis umbroytingina, sum kveikir longsulin at æra, trúgva og lýða Gud og framtíðarvánirnar um dýrdina, sum enn ikki er opinberað. Góðar gerðir eru ófrávíkiligur vitnisburður um frelsandi náði. Við at vera salt í einum heimi, sum rotnar, og ljós í einum myrkum heimi, eiga trúgvandi hvørki at taka seg úr heiminum ella at gerast meinlík honum; heldur eiga vit at gera bygdum og býum okkara væl, tí øll dýrd og æra tjóðanna er ætlað at verða hinum livandi Gudi eitt offur. Við at minnast hvørs skapningur hetta er og at vit eru himmalborgarar, eru vit kallaði til at elska næsta okkara sum okkum sjálvi, at gera øllum væl, og serliga teimum, sum hoyra húshaldi Guds til. Ríkið Guds, sum longu er nær, men sum enn ikki fult og heilt er vorðin veruleiki í hesum heimi, er ein glæma av Guds fullkomna valdi, sum ein dag fer at bróta fram í fullkomnum ljóma í endaligu endurloysnini av øllum skapninginum. Ríkið Guds er ein kraft, sum ger innrás í myrka ríki Satans og sundursorar tað, samtíðis sum henda kraftin endurføðir og endurnýggjar lívið hjá einstaklingum, sum eru bjargaðir úr hesum myrka ríki gjøgnum umvending, angur og trúgv. Tí setur hendan kraftin neyðturviliga eitt nýtt samfelag millum menniskju á stovn, eitt felagslív, millum menniskju og undir Gudi.

11. **Nýggja fólk Guds** Vit trúgva, at nýggja sáttmálafólk Guds longu eru í hinum himmalska Jerusalem; við Kristusi eru tey longu nú sett í hin himmalska heimin. Henda alheimssamkoman vísir seg ítøkiliga í staðbundnum samkomum, hvørja høvur er Kristus aleina; tí er hvør “staðbundin samkoma” í veruleikanum *samkoman*, húsarhald Guds, samkoma hins livandi Guds, súla og grundvøllur trúarinnar. Samkoman er likam Kristusar, eygnasteinur Hansara, ritað í Hansara hendur, og Hann hevur givið seg til hennara í allar ævir. Samkoman er eyðkend av gleðiboðskapi hennara, halgisiðum hennara, venjum hennara, stóru missión hennara og — framum alt — er hon eyðkend av kærleika hennara til Gud og av kærleikanum, sum limir hennara hava til hvønn annan og til heimin. Sera avgerðandi er tað, at hetta evangeliið, sum vit skatta, hevur bæði við tað persónliga og felagsskapin at gera, og at hvørki av hesum má forsømast ella gloymast. Kristus Jesus er friður okkara: Hann hevur ikki bara veitt okkum frið við Gud, men hevur eisini gjørt frið millum menniskju, sum áður vóru gjørd hvørjum øðrum fremmand. Ætlan Hansara var í Sær sjálvum at skapa eitt nýtt menniskja og soleiðis gera frið og í einum likami at sameina bæði jødar og heidningar við Gud gjøgnum krossin, tá Hann gjørdi fíggindskap teirra til einkis. Samkoman er eitt tekin um Guds framtíðar heim, tá limir hennara liva fyri at tæna hvørjum øðrum og næsta teirra ístaðin fyri at vera sjálvsøknir. Samkoman er likamligi bústaður Anda Guds og støðugi vitnisburður Guds í heiminum.

12. **Dópur og máltíð Harrans** Vit trúgva, at dópurin og máltíð Harrans eru sett á stovn av Harranum Jesusi sjálvum. Fyrstnevndi hevur at gera við inngongdina inn í felagsskapin í nýggja sáttmálanum, hin seinna snýr seg um støðugu staðfestingina av hesum sáttmála. Saman eru hesi bæði lyfti Guds til okkara, guddómliga fyriskipaðir náðimiðlar, okkara almennu lyfti um undirgivni undir hin einaferð krossfesta og nú upprisna Kristus, og vón okkara um afturkomu Hansara og fullfíggjanina av øllum lutum.

13. **Endurskapan alra luta** Vit trúgva á persónligu, dýrdmiklu og likamaligu afturkomu Harra okkara Jesu Krists saman við hinum heilagu einglum Hansara, tá Hann fer at útinna leiklut Sín sum hin endaligi dómarin og kongadømi Hansara fer at verða

fullkomið og fullfíggjað. Vit trúgva á likamligu uppreisn bæði hinna rættvísu og órættvísu og at hini órættvísu skulu rísa upp til dóm og æviga tilvitaða revsing í Helviti, sum Harri okkara sjálvur lærdi, og at hini rættvísu skulu rísa upp til æviga signing í nærveru Lambsins og Hansara, sum situr á trónuni, í nýggja himlinum og nýggju jørðini, heimi rættvísinnar. Tann dagin verður samkoman leidd fram fyri Gud, lýtaleys, orsakað av lýdni, líðing og sigri Kristusar, har øll synd er reinsað og allar hennara ræðuligu fylgjur í ævir eru gjørdar til einkis. Gud verður alt í øllum og fólk Hansara fer at verða hugtikið av ósigiliga heilagleika Hansara, og alt verður undurfullu og dýrdmiklu náði Guds til prís.